# Stilla gentan, lærarin

- Ein heilan dag fekk eg at umráða meg í, um eg vildi verða borgastjóri í Vági. Harraguð, hvat visti eg um starvið, kom rætt og slætt inn av gøtuni. Men tá eg hevði sodnað tað, segði eg ja, og tað var rætta avgerðin. Eg havi ongantíð angrað tað, hóast eg havi fingið nøkur knubs, sigur Kirstin Strøm Bech



Sosialurin

## Samrøða

**Anna Mortensen**

Sum rosinan í pylsuendanum endar Kirstin Strøm Bech hesa greinarøð av samrøðum við kvinnur í Suðuroynni.

Kirstin er útbúgvin lærari, og hevur verið borgarstjóri í Vági síðan 2004. Spurningarnir eru m.a. um kommunurnar skulu yvirtaka allan skúlan, hvussu hon heldur, at fleiri kvinnur fáast við í politiskt arbeiði, hvørjir tankar og visiónir hon hevur um framtíðar vinnulív í Suðuroynni og um samstarv og kommunusamanlegging.

– Tað harmar meg nógv, at vit ikki samstarva meira her suðuri, og at so nógv fokus er á klandri. Eg eri ímóti at vit, sum nú er, klamsa kommunurnar saman í eina, men eg eri fyri einum samstarvi, helst frá í dag av, sum hevur samanlegging til endamáls, sigur Kirstin, sum ikki eina løtu angrar, at hon kastaði seg, í leysari luft, út í politik, meðan harðast leikaði á í málinum um miðnámsskúla og ellisheim í Vági.

Hon letur meg vita, at hon ongantíð hevði droymt um at gerast politikari, stilla gentan úr Vági, sum altíð helt seg aftur, og ikki rættuliga tordi at vera við. Vit hava sett okkum við fundarborðið inni á skrivstovuni og Kirstin byrjar við byrjanini.

– Tað varð tosað nógv um politik og samfelagsviðurskiftini heima hjá okkum, serliga pápi var politiskt áhugaður, tosaði nógv um veiku samfelagsbólkarnir, og týdningin av, at man tók atlit til tey menniskjuni. Sjálvur kom hann úr einum heimi, har mamman sat eftir við 9 børnum, tá pápi hansara gekk burtur við Cheerfull á Skopunarfirði undir krígnum. Ikki nóg mikið við tað, eisini misti hon 5 av børnunum, so sorgin og trongu korini vóru natúrligur partur av lívinum.

### Ein dag at umráða seg í

- Hjá okkum trimum systrum hevur javnaðarhugsjónin tí altíð verið ein natúrligur partur av lívinum. Men tað er ikki fyrr enn hesi seinnu árini, eg eri vorðin virkin í politikki, og eg eri altso farin um tey 50. Var limur í lokalu nevndini hjá javnaðarfelagnum nøkur ár, játtaði at stilla upp til kommunustýrisvalið í 2000, bara til pynt, tað visti eg væl. Men viðurskiftini her í býnum gjørdu, at eg bleiv alsamt meiri áhugað í politikki, og segði ja til at stilla upp aftur í 2004. Men hvat hendi, eg varð vald inn, og í somu hast fekk eg bjóðað borgarstjórasessin, tí javnaðarflokkurin, sambandsflokkurin og uttanflokkalistin fóru í samgongu.

- Ein heilan dag fekk eg at umráða meg í! Harraguð, hvat visti eg um starvið, kom rætt og slætt inn av gøtuni, men tá eg hevði sodnað tað, og samanborið við aðrar borgarstjórar, sum eisini tóku við starvinum óroyndir, segði eg ja. Og tað var rætta avgerðin! Havi ongantíð angrað tað, men eg havi fingið nøkur knubs, málið um miðnámsskúlan og ellisheimið hevur verið hart, og eg veit ikki, hvat eg hevði gjørt í dag, um eg visti orrustuna, ið spurdist burturúr.

- Mítt hjartamál var og er ellisheimið, tí stórur tørvur er á búðplássum til gomul, og fráflytingin úr oynni hevur verið stór, serliga av kvinnum í burðarbúnum aldri. Tað er so hepnast okkum at fáa flakavirkið aftur í bygdina, men framvegis er umráðandi, at vit fáa nøkur "kvinnustørv", sum ikki eru tengd at veðri, vindi og streymi. Eisini heimið fyri sinnisveik, sum landið stendur fyri, er eitt av mínum hjartamálum. Nýggjur barnagarður til bygdina stendur fremst í huganum, eins og atkomumøguleikarnir hjá rørslutarnaðum.

- Men alt gongur ikki so skjótt, sum ein kundi ynskt, og at eg prioriteri viðurskiftini hjá rørslutarnaðum framum ein vegastubba onkunstaðni, broytir ikki nógv, tá tað allatíðina er ein balansugongd millum bleytu og hørðu virðini. Men eg haldi, at mínar prioriteringar